# Høgni Lisberg fær góð ummæli

**Høgni Lisberg fær góð ummæli uttanfyri landoddarnar fyri fløgu sína. Nú hava íslendingar hoyrt fløguna og ummælari hevur føgur orð at bera útgávuni. Eisini aðrir føroyskir tónleikarar klára seg væl í Íslandi, t.d. Eivør Pálsdóttir**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen,*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Íslendingar vilja hoyra føroyskar tónleikarar syngja á føroyskum. Teimum dámar málið og tað verður hildið at ljóða væl og er kanska eisini í summum førum "cool". Hetta sæst t.d. á, at fyritøkur lýsa á føroyskum, til dømis Domino's Pizza. Tó sleppa Týr og Clickhaze væl frá at syngja á enskum í Íslandi. Men hesir hava eisini løg á føroyskum, sum rættiliga hava sett ferð á føroysku bylgjuna í Íslandi.

Høgni Lisberg, trummuleikari í Clickhaze, gav fyri nøkrum mánaðum síðani út fløgu, har hann roynir seg á egnum beinum. Fleiri útlendskir ummælarar hava føgur orð at bera útgávuni, men tað venda vit aftur til í seinni grein, - fyrst vita vit hvat íslendingar halda:

Fløgan hevur enskan tekst, men hon er nú ávegis á íslendska marknaðin. Í farnu viku varð fløgan ummæld í Fréttablaðnum, og ummælarin, Smári Jósepsson, er hugtikin.

## Góð

Hann metir hesa fyrstu solo royndina hjá Høgna Lisberg vera góða og byrjar annars við at staðfesta, at føroyskur tónleikur er væl dámdur í Íslandi, har Clickhaze, Eivør, Týr og onnur hava gingið á odda.

Most Beautiful Things fær føgur orð frá ummælaranum, har hann rósar Høgna sum bæði tónasmiði og tónleikara. Og eisini tekstirnir eru góðir, verður sagt.

Men eisini hesin ummælarin telist millum teirra, sum heldur vil hoyra føroyingar syngja á føroyskum, heldur enn á enskum. Ummælarin heldur annars nógv av fløguni og hon gerst betri og betri, metir hann, og hann metir hana vera góða at leggja á fløguspælaran eftir ein strævnan arbeiðsdag.

Bestu løgini eru sambært ummælaranum When you get home og Fairy of Mine. Ein vøkur og ærlig fyrstaútgáva frá Høgna Lisberg, metir ummælarin. Farast kann inn á Fréttablaðið umvegis heimasíðuna www.visir.is

## Eivør og onnur

Heimmildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð, er m.a. útvarpsvertur og annanhvønn leygardag er hann at hoyra á Radio Reykjavík (www.radioreykjavik.is) . Hóast lagt er upp til í sendingini, at gamlir rock klassikarar eru at hoyra, so letur Jens Guð altíð nakrar føroyskar tónar sleppa framat, og har eru t.d. Høgni Lisberg og Eivør og mong onnur.

Jens sigur annars úr Íslandi, at til konsertina hjá Eivør síðsta fríggjadag við Graduelakórinn var so mikið av fólkið komið saman, at rúm var ikki fyri øllum. Eivør er eisini høvuðsnavn á Listahátíð Reykjavíkar. Nógv verður gjørt burturúr lýsingum og hjálpir hetta eisini uppá fløgusøluna hjá Eivør. Fløgan Krákan fór síðstu viku frá einum 32. plássi til eitt 16 pláss á yvirlitinum yvir mest seldu fløgurnar í Íslandi og er fløgan nú seld í 9000 eintøkum. Á 15 plássi er Bjørk og fløgan Gling Glo, sum er seld í 20.000 eintøkum síðani 1990.

Jens metir, at Krákan verður seld í 10.000 eintøkum, innan árið er runnið, og fløgan er nú eisini við á listunum yvir seldar fløgur í Danmark og Svøríki.




Vika 19, 2004
www.kaupthing.fo

# Stórt sannlíkindi fyri rentuhækking í USA í juni

Sum væntað hækkaði amerikanski tjóðbankin (FED) ikki teirra rentu týsdagin. FED megnaði eisini at orða peningapolitisku støðu teirra soleiðis, at marknaðirnir at kalla ikki ávirkaðust av hesum. Viðvíkjandi rentupolitikkinum, ætlar FED at ganga hóvliga fram og í samsvari við komandi búskargongdina. Umenn ein rentuhækking er væntu, verður hendan ikki brádlig ella ógvuslig.

Hóast hóvligu framferðina hjá FED endaði vikan við ógvusliga hækkandi lánsbrævarentum og lækkandi partabrøvum. Orsøkin var mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreðingin, sum aftur hesuferð gjørdist framúr positiv. Væntað varð, at 170.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn í apríl men talið gjørdist heili 288.000. Samstundis varð mars talið dagført við einari hækking.

Staðfestast kann nú, at nýggjar tíðir eru í amerikanska búskapinum og FED hevur nú nógmikið av próvtilfari til at hækka rentuna. Um næsta arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin, ið verður kunngjørd 4. juni, og onnur lyklatøl sum heild eisini verða positiv, kann roknast við, at FED hækkar amerikonsku rentuna tann 30. juni við 0,25%-stigum í 1,25%.

Evropiski miðbankin hevði eisini rentufund í farnu viku. Heldur ikki teir broyttu rentustigið. Hóast búskaparlig framgongd er í Evropa er ferðin enn lítil. Tí væntar Kaupthing framvegis ikki, at ein evropisk ella ein donsk rentuhækking verður at síggja fyrr enn seint í ár.

Roknskapirnir, ið vóru kunngjørdir í farnu viku vóru sum heild bjartir. Eisini roknskapurin hjá Danske Bank var bjartur og betri enn væntað, men av tí at bankin væntar at 2004 "einans" verður eitt vet betur enn 2003, lækkaði partabrævið 2,5% kunngerðardagin.

Gongdin í seinastu viku fer at seta dám á hesa vikuna. Ein mótrørðsla kann væntast, serliga á partabrævaøkinum. Tá rentuhækkingin gerst mera vís, kunnu partabrøv hækka aftur, tí søgan vísir, at tað er ikki rentuhækkingin sjálv, men óttin fyri komandi rentuhækkingum, ið leggur marknaðirnar undir trýst.

Hesa vikuna kunngerða m.a Cisco, Dell, GN og Lundbeck roknskap.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | [→] |
| 2 ára lánsbræv | 2,74% | 0,14% | [↑] |
| 5 ára lánsbræv | 3,82% | 0,14% | [↑] |
| 10 ára lánsbræv | 4,47% | 0,13% | [↑] |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 247,2 | -3,1% | [↓] |
| OMX, Svøríki | 661,7 | -4,1% | [↓] |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.674,1 | -1,8% | [↓] |
| S&P 500, USA | 1.098,7 | -1,7% | [↓] |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbræv í DKK | 104,76 | 0,0% | [→] |
| Evru Lánsbrøv | 165,42 | -0,1% | [↓] |
| Norrøn Partabrøv | 76,95 | -0,8% | [↓] |
| Altjóða Vøkstur | 63,27 | -0,3% | [↓] |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 628,56 | 0,9% | [↑] |
| EUR | 744,12 | 0,0% | [→] |
| GBP | 1.116,93 | 1,1% | [↑] |
| NOK | 91,87 | 1,8% | [↑] |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Smyril Line í samráðingum við hetlendingar

**Í løtuni samráðast Smyril Line og The Shetland Development Trust um, at hetlendski menningargrunnurin skal seta meiri pening i føroyska felagið**

ÍLØGUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum hjá Smyril Line hósdagin í farnu viku kom fram, at føroyska felagið fer at royna at styrkja kapitalgrundarlagið hjá felagnum. Tá varð sagt, at nevndin í Smyril Line enn ikki hevði gjørt nakað við hetta mál, men skjótt er borið at, tí nú er komið fram, at samráðingar eru millum føroyska felagið og hetlendska menningargrunnin, ið frammanundan eigur 50 milliónir krónur í Smyril Line.

## Smyril Line stórt álit millum hetlendingar

Hetlendska blaðið Shetland News skrivar, at samráðingar eru millum partarnar, og stjórin í hetlendska menningargrunninum, Neil Grant, váttar fyri blaðnum, at so er. Hann vil tó ikki gera aðrar viðmerkingar til tíðindini.

Á tíðindafundinum hjá Smyril Line beint eftir aðalfundin hósdagin segði Morgan Goodlad, ið er hetlendska umboðið í nevndini hjá Smyril Line, at hetlendingar hava sera stórt álit á Smyril Line, og hann ivaðist tí ikki í, at teir vóru sinnaðir at gera enn ein íløgu í føroyska felagið. Hann segði, at eftir at nýggja Norrøna var farin í sigling, vóru nógv fleiri ferðafólk at síggja í Hetlandi, og skipið hevur havt eina sera positiva ávirkan á hetlendska samfelagið. Tískil er Morgan Goodlad ikki í iva um, at um peningur er til tað, so vilja hetlendingar setta meiri pening í Smyril Line.



*Morgan Goodlad : Morgan Goodlad er hetlendskur nevndarlimur í Smyril Line, og hann hevur óivað ein fingur við í spælinum, nú Smyril Line og hetlendski menningargrunnurin samráðast um nýggja íløgu í føroyska felagið*

*mynd: Jens Kr. Vang*

# 35 milliónir í halli

**Fyrsta árið hjá Smyril Line við nýggju Norrønu í flotanum gjørdist sera vánaligt. Ársroknskapurin, ið var lagdur fram á aðalfundinum hósdagin, vísti eitt hall upp á slakar 35 milliónir krónur**

VINNULÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað sær einki serligt út fíggjarliga hjá Smyril Line. Rakstrarúrslitið í fjør var eitt hal upp á 34,9 milliónir krónur mótvegis einum yvirskoti upp á góðar 11 milliónir í 2002. Úrslitið var munandi verri, enn hvat leiðslan í Smyril Line hevði roknað við, og havandi í huga stóru lánsgjøldini, ið fella til gjaldingar í ár, er eyðsæð, at okkurt skal gerast sum skjótast.



*Klæmint Weihe, óli og Jóannes: Teir tríggir Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line, Óli Hammer og Jóannes á Váli, stjórar í felagnum hava nógv at hugsa um, nú felagið er í fíggjarligum vandasjógvi*

*mynd: Jens Kr. Vang*

## 140 milliónir falla til gjaldingar í ár

At talan er um eina trupla uppgávu, ið stendur fyri framman hjá leiðsluni í Smyril Line, er lítið av ivast í, tí sambært roknskapinum hjá felagnum falla ikki færri enn 140 milliónir krónur til gjaldingar í ár. Av hesum eru góðar 86 milliónir veðlán og veðskuld, meðan restin millum annað peningur, ið kreditorar eiga til góðar hjá Smyril Line fyri ymsar vørur og tænastur.

Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line, segði á tíðindafundinum eftir aðalfundin hósdagin, at úrslitið als ikki var nøktandi, tí teir høvdu væntað eitt avlop, men at teir framvegis hava góðar vónir. Hann ásannaði tó, at neyðugt er endurskoða allar fíggjarútreiðslurnar hjá felagnum til tess at lætta um útreiðslusíðuna. Til dømis kann hugsasat, at stóru veðhaldslánini í nýggju Norrønu fáa longri livitíð, so at árliga afturgjaldsbyrðan lækkar.

## Kapitalgrundarlagið styrkjast

Til tess at styrkja Smyril Line í hesum fíggjarligu truplu tíðum, hevur nevndin í felagnum gjørt av, at kapitalgrundarlagið skal styrkjast, um tað gerst neyðugt. Klæmint Weihe sigur, at nevndin hevur ta fatan, at stóru íleggjararnir í felagnum framvegis stuðla verkætlanini, og tískil hava teir góðar vónir um, at tað fer at bera til at fáa nýggjar íløgur frá hesum, um tørvur verður á tí.

Sum tað sær út í løtuni, verða eingir trupulleikar við gjaldførinum hjá Smyril Line í summar, men tá ið heystið kemur, er støðan ein onnur, og tí er spurningurin, hvat gera vit tá, sigur Klæmint Weihe. Tá er tað, at fíggjarligu byrðarnar av álvara fara at merkjast, sigur nevndarformaðurin í Smyril Line.

## Virksemi umskipast

Sum ein lið í menningini av Smyril Line og tilboðunum hjá felagnum, er ein nýggj ferðaætlan ávegis, sum verður býtt í trý. Millum annað fer Norrøna ikki at sigla upp á Bergen í vetrarsiglingini komandi ár, tí tað er neyvan nakað serligt av fólki á rutuni millum Bergen og Hanstholm á vetri, og tískil kann felagið spara nakað av útreiðslum til havnagjøld, olju og manning við at niðurleggja hesa farleið í vetrarsiglingini.

Ístaðin ætlar felagið at gera meiri við íslendska marknaðin, og serliga verður farið eftir íslendsku útflytarunum. Ein av nevndarlimunum í Smyril Line, Jónas Hallgrímsson, segði á tíðindafundinum, at stórur áhugi var millum íslendskar útflytarar at flyta feskan fisk av landinum við Norrønu, tí so var fiskurin hjá keyparunum á europeisku meginlandinum mánamorgunin. Jónas Hallgrímsson, ið hevur sitið í nevndini í Smyril Line í mong ár, sigur, at væntandi er eisini áhugi millum íslendingar at seta meiri pening í felagið. Hetta skal vónandi viga upp ímóti minkandi føroysku útflutninginum.